# GÓÐ TÍÐINDI

## EISINI TIL TÍN

***Gud elskar øll menniskju***
***...óannsæð hvør tú ert***
***...hvat tú hevur gjort***
***...hvar á klótuni tú hevur tín uppruna***
***...so hevur Gud forsóna seg við teg***

***Tí í Kristusi samdi Gud heimin við***
***seg sjálvan og tilroknar teimum***
***ikki syndir teirra……***
***2 Kor 5.19***

**Jesus er Guds útrætta hond til**
**øll menniskju**

**„So er skrivað, at Kristus skuldi líða og triðja dagin rísa upp**
**frá hinum deyðu,og at í navni Hansara umvending**
**og syndafyrigeving skal verða prædikað**
**fyri øllum fólkasløgum**
Luk 24:47

# Grundleggjandi:

## Frelsuverkið er:

## **1.** Guds og Kristi verk áleina

## **2.** Fult og heilt ein gáva fyri einki

*Tí av náði eru tit frelst, við trúgv – og tað ikki av tykkum sjálvum, tað er gáva Guds, Ef 2:8-9*

## Hvussu sær Gud uppá menniskja

*Gud vil at vit skulu hava tað gott*

*Jesus opinberaði Guds eginleikar:*

**1.** Hann elskaði syndaran

Allir tollarar og syndarar hildu seg nær hjá Honum, at hoyra Hann.
Men bæði Fariseararnir og hinir skriftlærdu knarraðu og søgdu: „Hesin tekur ímóti syndarum og etur við teimum!" Luk 15:1-2

**2.** Hann tók sær av teimum sjúku og veiku

Men táið kvøldið var komið, førdu tey til Hansara mong, sum sett vóru av illum andum; og Hann rak út andarnar við orði og grøddi øll hini sjúku –

fyri at tað skuldi ganga út, sum talað er við Esaiasi profeti, ið sigur: „Hann tók veikleikar okkara og bar sjúkur okkara." Matt 8:16-17

**3.** Hansara hjarta bløddi fyri fólkinum

"Jesus ferðaðist nú um í øllum støðum og bygdum, lærdi í sýnagogum teirra, prædikaði evangelium ríkisins og grøddi hvørja sjúku og hvønn veikleika. Táið Hann sá fólkið, tykti Honum hjartaliga synd í teimum tí tey vóru illa hagreidd eins og seyðir í ongan hirða hava." Matt 9.36-37

**Soleiðis sær Jesus uppá øll menniskju— Hann elskar øll og hevur talt øll við (inkludera) øll í frelsuverkið — eisini teg**

*Mong siga….tað var tá…. Tá Jesus var likamliga á jørð..*

## Bíblian sigur um Jesus:

*Jesus Kristus er hin sami í gjár í dag Og í allar ævir* *Hebr 13:8*

**HANN ER ONKI BROYTTUR HANN FRELSIR—HJÁLPIR—GRØÐIR ENN Í DAG**

# Hvussu kann eg uppliva frelsuna??

## Við at takað ímóti í trúgv

## Hvat hendir tá ein tekur ímóti í trúgv

## Tað hendir nógv !!!!!

### 1. Tú fært kraft at verða eitt Guds barn (ræ ttindi)

Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds – teimum, ið trúgva á navn Hansara;tey eru føðd, ikki av blóði, heldur ikki av holds vilja, heldur ikki av mans vilja, men av Gudi. Jóhs 1:12

### 2. Tú verður ein nýggjur skapningur í honum

Um tí ein er í Kristusi, er hann nýggjur skapningur, hitt gamla er farið – tað er vorðið nýtt 2 Kor 5:17

### 3. Tú verður frelstur og ræ ttvísgjørdur í honum

Tí um tú við munninum játtar Jesus sum Harra og trýrt í hjartanum, at Gud reisti Hann upp frá hinum deyðu, so skalt tú verða frelstur.
Tí við hjartanum trýr ein – til ræ ttvísi; og við munninum játtar ein – til frelsu. Róm 10:9-10

Trúgv er handling .. (Eg trúði tíð talaði eg Sl.116:10)

***Vilt tú boyggja teg fyri Honum og takað ímóti***
***So skal Hann eisini verða tín bjarging.***

***Fáið tí annað sinni og vendið við, so syndir tykkara kunnu verða útstrikaðar, og lívganartíðir kunnu koma frá ásjón Harrans, Ap 3:19***

*Efb — www.gottnytt.org*